framhald av síðu 19

Eisini heldur Allan Mørkøre tað verða undrunarvert, at orka verður løgd í at leita eftir hálvum føroyingum, sum møguliga kunnu spæla á føroyska landsliðnum. Hetta er ikki serliga motiverandi fyri teir ungu spælararnar her heima, heldur hann og sigur víðari, at tað tykist sum um at lítil og eingi krøv verða sett til hesar leikarar. Spæla teir á rímuligum støði, sum t.d. donsku 2. deild, so verða teir mettir nóg góðir til landsliðið, og tað er skeivt, sigur Allan.

Skippa venjaraparið

Sambært Allan Mørkøre er Fótbóltssamband Føroya alt ov lítið kritiskt, tá ið tað kemur til venjaraspurningin. Hann heldur, at tað er eitt sjálvsagt krav, at venjarin býr í Føroyum, og at venjaraparið hvørt vikuskiftið ferðast runt og hyggur eftir dystum í bestu føroysku deildini. Sjálvsagt skulu teir eisini halda eyga við útisetunum, men nógv tann størsti parturin av landsliðsevnum er at finna her heima á klettunum, sigur Allan. Sum nú er, virkar tað næstan sum um, at venjarastarvið bert er eitt frítíðarítriv hjá Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen, sigur klaksvíkingurin.

Allan Mørkøre ivast ikki í, at peningurin fyri at hava teir báðar Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen sum venjarar røkkur langt, og hansara ráð eru tí, at farið verður undir at finna ein minni kendan venjara við góðum pappírum, sum er sinnaður at búgva her á landi og fylgja við í føroyskum kappingini.

Ofta hevur man hoyrt, at FSF hevur eygleiðarar, sum fylgja við í, hvussu tað gongur úti í feløgunum, men hetta trýr Allan Mørkøre als ikki uppá. Hann sigur seg ivast í, um tað yvirhøvur er nakað samskifti millum landsliðsvenjararnar og venjararnar í feløgunum, og tað ber ikki til, tí eftir hansara tykki er tað alneyðugt, at Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen fylgja við í gongdini hjá teimum einstøku spælarunum. Allan Mørkøre viðgongur tó, at landsliðið hevur fingið nøkur heilt góð úrslit undir Henrik Larsen, men hann heldur, at tað er fyrst og fremst leikarunum fyri at takka.

Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari

– skilji væl atfinningarnar

Hjálparvenjarin á føroyska landsliðnum, Jógvan Martin Olsen, sigur seg væl duga at skilja, at fólk halda tað verða ein trupulleika við einum høvuðsvenjara, sum býr í Danmark, og hjálparvenjara, sum samstundis er 1. deildarvenjari í Føroyum

LANDSLIÐIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Hjálparvenjarin á landsliðnum, Jógvan Martin Olsen, skilur væl atfinningarnar, men hann heldur tó, at Henrik Larsen og hann sjálvur hava nóg gott grundarlag til úttøku av landsliðnum Savnsmynd

Aðrastaðnis her á síðunum verður langað harðliga út eftir skipanini við venjarum kring føroyska landsliðnum í fótbólti. Tann, ið fær flestu ákoyringarnar, er kanska hjálparvenjarin Jógvan Martin Olsen, sum fyrrverandi landsliðsleikarin, Allan Mørkøre, stýrir øllum á føroyska landsliðnum.

Fylgja væl við

Sjálvur sigur Jógvan Martin, at hann fylgir sera væl við í føroysku kappingini. Hann sær 18 landskappingardystir um árið í 1. deild, har NSÍ er annað liðið, og tá síggi eg sjálvsagt eisini leikarar á móstøðuliðnum, sigur hann. Tað noyðist eg til tess at finna út av, hvussu eg leggi tann besta taktikkin, sigur hann. Jógvan Martin sigur eisini, at er onkur dystur forskotin, so fer hann sjálvsagt til hesar, og harafturat sær hann eisini allar europeisku dystirnar, sum tey føroysku feløgini leika á heimavølli. Tilsamans heldur Jógvan Martin, at hann man síggja einar 50 dystir um árið, har landsliðsevnir taka lut úti á vøllinum.

Harafturat hevur hjálparvenjarin á føroyska landsliðnum regluligt samband við venjararnar í føroysku feløgunum, sambært honum sjálvum okkurt um eina ferð um vikuna, hóast tað sjálvsagt eru nakrar, sum tosað verður oftari við enn aðrir. Hetta verður gjørt, soleiðis at vit kunnu fylgja við í, hvussu menn eru fyri, sigur Jógvan Martin Olsen. Harafturat er Henrik Larsen javnan í Føroyum og hyggur eftir dystum, sigur Jógvan Martin, og tí hava vit grundarlag fyri at úttaka landsliðið, sigur hann. Eisini tosa vit saman umvegis telefon hvørja einastu viku fyri at tosa um teir einkultu spælararnar, og um hvussu tað gongur hjá teimum.

FSF góðtók støðuna

At summi halda tað verða ein trupulleika, at Jógvan Martin umframt at verða hjálparvenjari á landsliðnum eisini er 1. deildarvenjari, skilur hann sjálvur væl. Hann greiður frá, at hann í mong ár hevði starast innan FSF, men hevði fingið hug til at royna seg í markini, sum hann málber seg. Eg saknaði dagligu venjingarnar, sigur Jógvan Martin. Tí vendi hann sær til leiðsluna í FSF og segði, at hann hevði hug til at venja eitt 1. deildarlið, og FSF góðtók, at hann bæði virkaði sum hjálparvenjari á landsliðnum og 1. deildarvenjari hjá NSÍ.

Jógvan Martin Olsen sigur, at soleiðis eru treytirnar, sum hann og Henrik Larsen eru settir undir, og tað kann FSF liva við, men hann skilur tó atfinningarnar.

At tað er Jógvan Martin, ið stýrir øllum, soleiðis sum Allan Mørkøre ber fram, hevur hjálparvenjarin sjálvur ikki hug til at gera viðmerkingar til, men vísir til høvuðsvenjaran.

Gott við kritikki

At fólk innan føroyska fótbóltsheimin nú eru frammi við peikifingrinum, fegnast Jógvan Martin um, tí tað vísir bara, at tað er áhuga fyri føroyska landsliðnum. Hann avvísir heldur ikki, at onkrar úttøkur hava verið skeivar, og somuleiðis sigur Jógvan Martin, at viðgerðin av landsliðnum í fjølmiðlunum kann eisini gera venjaraparið varnar við okkurt ella onkran, sum teir ikki hava givið sær gætur um áður.

Jógvan Martin dugir ikki at skilja, at onkur heldur landsliðið verða eitt lukkað land, tí sera nógvir spælarar hava fingið møguleikan seinasta árið. Sum dømir um hetta nevnir hann Jón Róa Jacobsen, Atla Danielsen, Hjalgrím Elttør, Jann Inga Petersen og Símun Samuelsen. Hetta eru alt ungir leikarar, og Jógvan Martin ásannar, at venjararnir mangan hava valt at tikið ungar og óroyndar leikarar fram um rutineraðar kreftir, og tað hevur skapt øsing viðhvørt. Vit arbeiða við einum bruttohópi upp á gott og væl 30 leikarar, men tað merkir ikki, at aðrir ikki sleppa framat, sigur hann at enda. At onkur leikari kanska hevur fingið eitt sindur langan snór kann væl verða, men tað er, sum eygað sær, heldur hjálparvenjarin á føroyska landsliðnum.

Óli Holm, FSF-formaður

- vit hava fult álit á venjaraparinum

– vit hava fult álit á venjaraparinum. Nývaldi formaðurin í FSF, Óli Holm, sigur, at fótbóltssambandið hevur fult álit á, at landsliðsvenjararnir gera sítt arbeiði til lítar

LANDSLIÐIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Formaðurin í FSF sigur, at fótbóltssambandið hevur valt at seta ein útlendskan landsliðsvenjara, og treytirnar eru, sum tær nú einaferð eru.

Avmarkar møguleikarnar

Óli Holm ásannar tó, at tað setur nakrar avmarkingar, tá ið høvuðsvenjarin býr uttanlands og hjálparvenjarin sjálvur venur eitt 1. deildarlið, men hetta eru tær spælireglur, sum FSF hevur valt, og so kann man halda tað man vil, sigur formaðurin í FSF. Tó sigur

Formaðurin í FSF, Óli Holm, sigur seg hava fult álit á venjaraparinum hjá føroyska landsliðnum Mynd: Álvur Haraldsen

Óli Holm, at kanska eigur man at umhugsa, um tað skal verða eitt setanarkrav, at venjarin skal búgva í Føroyum, meðan føroyska kappingin er í gongd.

Leiðslan í fótbóltssambandinum hevur fult álit á teir báðar Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen, og vit eru sannførdir um, at teir altíð taka teir bestu leikararnar út, tá ið landsliðið verður úttikið, sigur Óli Holm. Eisini heldur FSF-formaðurin, at hóast hjálparvenjarin ikki hevur møguleika fyri at ferðast runt og hyggja eftir dystum í bestu deildini, so kennir Jógvan Martin Olsen føroyskan fótbólt kanska betur enn nakar annar, og tí haldi eg ikki, at nøkur forðing er fyri, at hann er hjálparvenjari á landsliðnum, sigur Óli Holm.

Frank Skytte

- Landsliðsúttøkurnar eru heilt burturvið

Danin Frank Skytte, ið hevur vant bæði TB, B68 og HB her á landi, sigur seg mangan hava undrast á, hvat ið verður nýtt sum grundarlag í sambandi við úttøku av føroyska landsliðnum í fótbólti

LANDSLIÐIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Hann er bersøgin, tá ið spurt verður um føroyska landsliðið, danin Frank Skytte, sum í fleiri ár hevur virkað sum venjari í Føroyum. Frank Skytte sigur, at fyri honum virkar tað sum um, at landsliðsvenjararnir hava ein ranglista við nøvnum. Við hesum sipar hann til, at er ein av teimum ovastu 18 ikki tøkur, so verður nummar 19 úttikin, óansæð um tað er ein áleypari, ið kemur fyri ein verjuleikara. Somuleiðis heldur Frank Skytte, at tað als ikki verður hugt eftir, hvussu dagsformurin hjá teimum einkultu spælarunum er.

Danski venjarin, Frank Skytte,Ið hevur drúgvar royndir í føroyskum fótbólti, sigur seg mangan hava undrast á landsliðsúttøkuna í Føroyum Mynd: Álvur Haraldsen

Skipanin kring venjaraparið ónøktandi

Tá ið tosið kemur inn á skipanina við venjaraparinum á føroyska a-landsliðnum, sigur Frank Skytte, at her er neyðugt við kollveltandi broytingum, um føroyska landsliðið skal koma eitt fet víðari. Danin heldur tað verða eitt sjálvsagt krav, at ein føroyskur landsliðsvenjari býr í Føroyum, um ikki alt árið, so í hvussu so er meðan føroyska kappingin er í gongd.

At hjálparvenjarin á landsliðnum samstundis er høvuðsvenjari hjá einum føroyskum 1. deildarliðið, heldur Frank Skytte verða blóðskeivt. Hann sigur, at skal Jógvan Martin Olsen virka sum venjari hjá einum føroyskum felag, so skal tað verða í næstbestu deildini, tí annars hevur hann ikki umstøður til at fara runt til dystir og hyggja at landsliðsevnum. Henrik Larsen er so sjáldan í Føroyum, at hann kann ikki hava fingurin á pulsinum viðvíkjandi spælarunum í føroysku kappingini, sigur Frank Skytte og leggur afturat, at tað eisini má verða trupult hjá hjálparvenjaranum, Jógvan Martini Olsen, at fylgja við í gongdini hjá teimum einstøku spælarunum.

Um Jógvan Martin kann úttaka landsliðið út frá tí, sum hann sær, tá ið NSÍ spælir móti teimum ymisku liðunum, so ger hann ikki sítt arbeiði sum NSÍ-venjari til lítar, heldur Frank Skytte. Men í prinsippinum er tað Jógvan Martin, ið setur landsliðið, tí Henrik Larsen hevur næstan onki grundarlag at úttaka liðið uppá, sigur danski venjarin. Frank Skytte sigur eisini, at tað tíð hann hevur virkaði sum venjari í Føroyum, ringdi Henrik Larsen eina ferð til hansara fyri at frætta, nær ein dystur skuldi leikast, meðan Jógvan Martin hevur ringt nakrar ferðir, tá ið landsliðið hevur verið úttikið.

Altíð teir somu á landsliðnum

Sum áðurnevnt heldur Frank Skytte, at úttøkan av landsliðnum er fullkomiliga burturvið. Hann sigur, at tað altíð eru teir somu, ið verða úttiknir, meðan aðrir leikarar, ið vikuskifti eftir vikuskifti imponera í landskappingini als ikki koma upp á tal, sigur hann.

Í Danmark er tað í hvussu so er so, at Morten Olsen tekur teir bestu menninar út, meðan tað tykist sum um, at Jógvan Martin hugsar, at føroysku ungdómslandsliðini, sum hann millum annað sjálvur venur, skulu lata einar tveir leikarar til a-landsliðið um árið, óansæð um teir eru nóg góðir til tað, sigur Frank Skytte. Til dømis heldur Frank Skytte tað verða ótrúligt, at menn sum Hans á Lag, Ove Nysted, Bartal Eliasen og Símun Eliasen als ikki eru í landsliðshitanum, tí eftir hansara tykki eru teir betri enn nógvir av teimum, sum eru fastir í landsliðshópinum. Tað tykist sum um, at føroyska landsliðið er eitt lukkað land. Hetta er ótrúliga spell, sigur Frank Skytte, tí hetta minkar um hugin hjá spælarum, sum áttu at verið sjálvsagdir í landsliðshópinum.

Bartal Eliasen, landsliðsevni

– tað tykist mangan løgið

Hóast Bartal Eliasen hevur verið ein av okkara allarfremstu verjuleikarum í nógv ár, so hevur hann ongantíð av álvara fingið møguleikan á landsliðnum

LANDSLIÐIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Millum fótbóltsáhugaðar føroyingar hevur tað mangan vakt ans, at Bartal Eliasen so sjáldan hevur verið úttikin til føroyska landsliðið. Hóast Bartal í mong ár hevur verið millum mest sjónligu leik-ararnar í føroysku kapp-ingini, so er hann bert skrásettur fyri fýra landsdystir.

Eg havi uppgivið landsliðið

Bartal Eliasen sigur, at hann mangan hevur undrast

Fuglfirðingurin, Bartal Eliasen, Ið leingi hevur verið millum mest eyðsýndu leikararnar í heimligu kappingini, sigur seg langt síðani hava avskrivað landsliðið Savnsmynd

á landsliðsúttøkuna. Sum dømi um hetta nevnir hann, at hann fyri nøkrum árum síðani var við landsliðnum á venjingarlegu á Kypern, har teir leiktu tveir dystir móti ávíkavist Pólandi og Andorra. Í báðum dystunum leikti Bartal allar 90 minuttir, og aftaná fekk hann at vita frá Jógvan Martini Olsen, sum tá hevði ábyrgdina av liðnum, at hann var komin ógvuliga væl frá dystunum báðum. Tí hevði hann væntað at frætt aftur frá landsliðnum, men enn hevur hann einki hoyrt. Av somu orsøk sigur Bartal Eliasen, at fyri hansara viðkomandi er landsliðið ein farin tíð, hóast hann einans er 27 ára gamal. Eg havi fleiri ferðir mett meg nóg góðan til landsliðshópin, men eri als ikki komin upp á tal, og tað virkar eitt sindur løgið í mínum eygum, sigur Bartal Eliasen.

Eisini sigur Bartal, at hann ofta hevur undrast á, at tað so mangan eru leikarar úr NSÍ, ið verða úttiknir, tá ið onkur meldar avboð til landsliðið. Seinasta dømi um hetta var í vetur, tá ið landsliðið fór á venjingarlegu í Spania. Stutt undan venjingarleguni var ein hópur savnaður á Svangaskarði til venjingar, og tá ið hópurin so fór avstað til Spania, vóru fleiri broytingar í hópinum. Millum annað var Óli Hansen úr NSÍ úttikin heldur enn Símun Eliasen úr HB, sum kanska var besti verjuleikarin í Føroyum í fjør, heldur Bartal. Somuleiðis heldur Bartal tað verða eitt náttúrligt krav, at ein føroyskur landsliðsvenjari býr í Føroyum, meðan kappingin her heima er í gongd, so at hann kann fylgja við teimum einkultu spælarunum, og hvussu tað gongur hjá teimum.